# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



## Amalia og Brynhjálf Sigurðsson 60 ár

Sunnudagin 5. desember fylti Brynhjálf Sigurðsson úr Klaksvík 60 ár. Og 11 dagar seinni tann 16. desember fyllir kona hansara, Amalia, somuleiðis 60.

Brynhjálf er ættaður úr Klaksvík. Hann er sonur Hansiu og Ingolf Sigurðsson. Mamma hansara var úr Fuglafirði. Tey áttu fimm børn.

Hann fór í læru á Skipasmiðjuni hjá Kjølbro. Hann arbeiddi har í nógv ár og aftaná at hava verið í Grønlandi í eitt tíðarskeið, fór hann umborð á ein trolara hjá J.F. Kjølbro at arbeiða sum maskin-maður, til hann fyri trimum árum síðni gjørdist sjúkur og mátti fara í land.

Amalia er yngsta dóttir Karl og Sunnevu Michaelsen úr Kunoy. Hon starvaðist sum ung á vaskarínum á Klaksvíkar sjúkrahúsi, men tey seinastu árini hevur hon arbeitt sum vaskikona.

Brynhjálf og Amalia giftust í 1964 og eiga tey tveir synir. Ingi og Hans Kári. Tey eiga fýra ommu og abbasynir.

Í 1964 vóru tey bæði og arbeiddu í Føringahavnini í Grønlandi. Hann arbeiddi í smiðjuni og hon á Sjómansheiminum Lívdini.

Tey hava bæði gingið nógv í KFUM og K, har Amalia bæði hevur sungið við í kórinum og verið í sjómanskvinnuringinum í mong ár.

Føðingardagarnir verða hildnir leygadagin 11. desember heima hjá Brynhjálfi og Amaliu.

Teimum verður ynskt hjartaliga til lukku við stóru døgunum og Guds signing í framtíðini.

**Vinfólk**

**Dagurin**

**7. desember. Agaton**, deyður ár 250. Rómverskur hermaður, sum var kristin og varð tikin av døgum, tá ið Decius var keisari.

Grikska navnið merkir *góður*.

**Gullbrúdleyp**

Í dag, 7. desember hava Jákup Eli og Ingrid Steffensen í Klaksvík, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


Bileftirlit Føroya:

# 20 prosent færri persónbilar seldir



**Sølan av nýggjum bilum minkar framvegis. Serliga er sølan av persónbilum minkað nógv. Ein framskriving, av hagtølunum fyri desember, vísir, at samlaða afturgongdin í bilasøluni verður umleið 19 prosent**

BILASØLA

Í tíðindaskrivi frá Bileftirlitinum sæst at sølan av nýggjum persónbilum er minkað við meira enn 20 prosentum í mun til í fjør.

Sama tíðarskeið í fjør vórðu seldir 1271 persónbilar í mun til 1007 í ár.

Sølan av vøruvognum er minkað við 21,5 prosentum.

Ein framskriving av hagtølunum fyri desember mánað vísir, at væntandi verða umleið 1.550 nýggj akfør skrásett í 2004, samanborið við 1.910 í 2003. Hetta er ein mett afturgongd upp á 360 akfør, svarandi til umleið 19%.

Í november vóru 13 nýggj prutl skrásett og higartil í ár eru 207 nýggj prutl skrásett.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-NOV í 2004 og 2003.**

| Akfaraslag | Nov 2004 | Nov 2003 | Broyting Nov 03/04 | Jan-Nov 2004 | Jan-Nov 2003 | broyting 2003-2004 | %broyting 2003-2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 3 | 1 | 2 | 200,00% |
| Bussar | 0 | 0 | 0 | 1 | 4 | -3 | -75,00% |
| Kampingvogn | 0 | 0 | 0 | 5 | 1 | 4 | 400,00% |
| Hýrubilar | 2 | 1 | 1 | 28 | 19 | 9 | 47,37% |
| Lastbilar | 1 | 1 | 0 | 14 | 22 | -8 | -36,36% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 3 | 6 | -3 | -50,00% |
| Motorsúkkla | 0 | 1 | -1 | 14 | 13 | 1 | 7,69% |
| Neyðsendakfar | 0 | 2 | -2 | 1 | 4 | -3 | -75,00% |
| Persónbilar | 84 | 98 | -14 | 1007 | 1271 | -264 | -20,77% |
| Smábussar | 1 | 0 | 1 | 7 | 6 | 1 | 16,67% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 2 | 4 | -2 | -50,00% |
| Viðfestivognar | 5 | 8 | -3 | 113 | 125 | -12 | -9,60% |
| Vøruvognar | 27 | 20 | 7 | 193 | 246 | -53 | -21,54% |
| Samlað | 120 | 131 | -11 | 1391 | 1722 | -331 | -19,22% |